# SAVNSFAGNAÐUR 2009

## ORKA



*Aldur*, Janus Kaman 1913 - 2009

**Alduorka** *er gagnnýtt orka, ið ein alda gevur frá sær, tá hon verður leidd inn í ein tunnil. Orkan verður útvunnin av trýstinum í tunlinum.*

- Hvat sært tú í myndini?
- Hvat tilfar er myndin prentað á?
- Hvat annað er listamaðurin kendur fyri enn grafiska list?
- Hvat samband er millum aldurnar og malagrót?
- Hvat dámar tær ljóðið frá aldunum?



*Bretskur trolari*, Jack Kampmann 1914 - 1989

**Motororka** *er gagnýtt orka frá einum motori. Motorurin brennur eitthvørt brennievni og gevur harvið orku frá sær.*

- Hvat sært tú í myndini?
- Hvørji ljóð hoyra við til motororku?
- Hvussu dálka motorar?
- Hvørja ávirkan hevði motororka á samfelagið?
- Hvat dámar tær luktin av bensin?



*Hagamynd*, Arnold Vegghamar f. 1937

**Sólorka** *er orkan í ljósinum frá sólini. Uttan fyri jarðloftshavið, atmosferuna, er sólorkan uml. 1.353 kWh/m2. Ein partur av orkuni verður kastaður aftur av jarðarinnar lofthavi. Í Havn er tað tilsvarandi talið 1.075 kWh/m2.*

- Hvør litur er mest áberandi í myndini?
- Hvar í náttúruni eru vit støðd?
- Hvat minna steinarnir í myndini teg eisini um?
- Veitst tú, hvussu orka verður vunnin út úr sólarljósi?
- Hvat dámar tær gult?

LISTASAVN FØROYA